## DAGSINS MEINING

# Galskapurin má steðga

Eygað fyri eygað og tonn fyri tonn. Neyvan nakrantíð í søguni hava menniskju megnað at livað upp til hesi orð úr Gamla Testamenti sum í dagsins Ísrael/Palestina. Hevndarhugurin og hevndaratgerðirnar tykjast ongan enda at fáa. Ísraelsk børn og vaksin og palestinsk børn og vaksin eru offur í einum stríði, sum er við at hótta sjálvan heimsfriðin. Palestinskir sjálvmordarar og ísraelskir stríðsvognar eru vorðin mest vanliga gerandismyndin á sjónvarpsskíggjunum kring allan heimin.

Tað er ræðandi og ræðuligt aftur og aftur at skula síggja hesi endaleysu morðini á sivilfólk. Umheimurin stendur sum múlabundin og hyggur at – uttan at kunna gera nakað fyri at hjálpa ella bøta um støðuna. Seinasta atgerðin framd móti ísaelum á feriu í Egyptalandi er bert meira brenni á hevndarbálið. Nú hevur Ísrael aftur bóltin. Hvussu og hvar skal henda seinasta yvirgangsatsóknin hevnast…….

Tað er ringt fyri ikki at siga ómøguligt at taka partí við nøkrum av pørtunum í hesum eljustríði. Ein dag hatar tú palestinar fyri at hava dripið ósek jødabørn, tann næsta dagin er hetta sama hatur móti ísraelsku stjórnini og tess stríðsvognum, sum taka lívið av steinkastandi palestinskum børnum.

Sleppur hetta eirindaleysa hatur og stríð at halda fram verður endin - ikki bert steinandi palestinsk børn ella granatir frá ísraelskum stríðsvognum – eitt nýtt Sodoma og Gomorra, har nógv sterkari og meira oyðileggjandi vápn verða tikin í brúk. So stórur og sterkur er hevndarhugurin vorðin, at stríðið fyrr ella seinni endar við eini ógvusligari vanlukku. Og tað er tá, at kjarnorkubumba og bakteriulogisk vápn koma einum til hugs. Er tað ikki bara ein spurningur um tíð til vit fara at síggja túsundtals ísraelar tiknar av døgum í eini og somu atgerð! Og hvat skulu ísraelar so hevna seg við! Tveita atombumbur sínar móti, ja hvørjum!

Her má vend koma í . Kunnu partarnir sjálvir ikkisemjast, so má umheimurin koma uppí. Her er tað USA, sum situr við lyklinum. Men Bush hevur alla tíðina vent bakið til henda ræðuliga veruleika. Hugsar um sítt afturval. Tað má tí vera eitt altjóða krav til amerikanarar at sleppa sær av við Bush og hansara fundamentalisku hernaðarheykar, sum bara kenna til at seta hart móti hørðum, sum einki forstáilsi hava fyri at skapa seming og byggja brýr við friðaliga midlum.

ST má og skal leggja uppí stríðið í Miðeystri. Tá USA ikki vil, so má ST taka hesa ábyrgd á seg, rætt og slætt fyri at verja heimsfriðin. Ísrael má tvingast til at gevast við sínum hevndaratgerðum og palestinar og tess islamisku stuðlar mugu tvingast til at gevast við yvirgangsatgerðunum. Partarnir mugu sessast við samráðingarborðið einaferð med alla og báðir partar mugu taka í egnan barm. Ísrael má viðkenna ein palestinskan stat og lata hertikin landaøki aftur. Og palestinar og islamsku stuðlar tess mugu góðtaka ísraelska statin. Eisini føroyingar eiga at gera sína ávirkan galdandi. Heldur enn bara at fordøma palestinar eiga vit eisini (eisini vinir Ísraels) at fáa ísraelsku stjóninia at rætta hondina fram til eina semju og loysn, sum báðir partar kunnu liva við. Tíðin er farin frá "eygað fyri eygað og tonn fyri tonn" hugburðinum. Hann hevur spælt fallitt. Nú mugu allar góðar kreftir gera sína ávirkan galdandi.

**Sosialurin**

# Alt kann ikki innflytast og seljast í Føroyum…

**– Eftir arbeiðsumhvørvislógini eru ymiskar reglur, ið skulu haldast, tá ið ræður um framleiðslu og innflutning av tekniskari útgerð, men regluverkið í Føroyum er ikki eins væl útbygt, sum eitt nú í Danmark, tá ræður um arbeiðsumhvørvi sum heild, sigur Arbeiðseftirlitið**

GALDANDI REGLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Arbeiðseftirlitið sigur, at tá ið sentralhitaketlarnir eru CE-merktir, merkir tað, at framleiðarin - í hesum føri Hógv - hevur tikið støðu til ávísar spurningar og hevur undirskrivað eina "EF-overensstemmelseserklæring". - Tað er at gleðast um, at Hógv hevur eina framleiðslu á so høgum støði. Hinvegin er ikki rætt, at ongar reglur eru fyri innflutningi og sølu í Føroyum*

Arbeiðseftirlitið hevur vent sær til Sosialin við viðmerkingum til greinina, vit høvdu í blaðnum um miðjan september um eina CE-góðkenning, sum ketlavirkið, Hógv í Søldarfirði, hevur fingið.

Stovnurin heldur, at greinin er áhugaverd.

– Greitt verður greitt frá, at Hógv hevur fingið ketlarnar, sum teir framleiða, CE-góðkendar, og at hetta tryggjar, at dygdin er á høgum støði, og at orkunýtslan er so lág sum gjørligt. Hetta er púra rætt. Fyri at kunna seta eitt CE-merki á eina vøru, eru ávís viðurskifti, ið skulu vera í lagi, og er CE-merkið tað sjónliga prógvið um at so er, sigur Arbeiðseftirlitið.

– Taka vit sentralhitaketlar til upphitan av sethúsum sum dømi, skulu hesir lúka treytirnar í kunngerð nr. 79, frá 17. august 1999, dampketlar við útgerð og passing av slíkum, umframt kunngerð nr. 129, frá 4. september 1995, um innrætting av tøkniligum hjálpartólum. Hetta eru reglur sambært arbeiðsumhvørvislógini, og verður her ikki komið inn á møguligar reglur eftir øðrum lógum.

Arbeiðseftirlitið sigur, at tá ið sentralhitaketlarnir eru CE-merktir, merkir tað, at framleiðarin - í hesum føri Hógv - hevur tikið støðu til ávísar spurningar og hevur undirskrivað eina "EF-overensstemmelseserklæring".

– Tað er at gleðast um, at Hógv hevur eina framleiðslu á so høgum støði.

### Reglur galdandi

Arbeiðseftirlitið vísir á, at í byrjanini av umrøddu grein stendur (sitat): "Í Føroyum eru eingi krøv til innfluttar vørur. Alt kann keypast ella seljast."

– Hetta er ikki rætt. Eftir arbeiðsumhvørvislógini eru ymiskar reglur, ið skulu haldast, og eru longu nakrar av teimum nevndar omanfyri.

Arbeiðseftirlitið sigur, at reglur eru galdandi, tá ræður um framleiðslu og innflutning av tekniskari útgerð í Føroyum.

Stovnurin ásannar tó, at regluverkið í Føroyum ikki er eins væl útbygt, sum eitt nú í Danmark, tá ræður um arbeiðsumhvørvi sum heild.

– Er nakar í iva um, hvørjar reglur eru galdandi um ávís arbeiðsumhvørvisviðurskifti, eitt nú tekniska útgerð, innrættan av virkjum, útinnan av arbeiði, evni og tilfar, eru fólk vælkomin at seta seg í samband við Arbeiðseftirlitið, sigur stovnurin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Nýggj matstova í Saltangará:

# Casa Blanca: Ikki miljóningar beinanvegin

**– Vit fara ikki at leggja okkum eftir at fylla húsið við fólki, so ikki er verandi inni. Hóast vit hava fult skeinkiloyvi, verður dentur lagdur á hugnaligt matstovuvirksemi. Tað ger einki, um vit ikki gerast miljóningar tann fyrsta dagin, sigur Pætur Rasmussen, sum saman við konu síni, Sally, læt nýggja matstovu upp í Saltangará í gjár**

MATSTOVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*– Tað kostar at fara út at eta. Fólk tosa um hetta, bæði áðrenn tey avgera at fara, og eisini tá ið dagurin ella kvøldið er liðugt. Tí er ógvuliga umráðandi fyri okkum, at fólk eru nøgd við ta tænastu, tey fáa og við umstøðurnar, vit hava at bjóða teimum, sigur Pætur Rasmussen, sum saman við konuni, Sally, hevur latið nýggja matstovu upp í hølunum, har John's Resturant var*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í gjár klokkan 18 læt nýggj matstova upp í Saltangará. Matstovan, sum hevur fingið navnið, Casa Blanca, er í hølunum, har Stokkastovan – og seinni John's Resturant - var. Navnið á nýggju matstovuni er spanskt og merkir, "Hvíta Húsið".

Tey, ið standa aftanfyri Casa Blanca, eru hjúnini, Pætur og Sally Rasmussen. Tey búgva í Sandavági, men Pætur er skálamaður, og Sally er úr Onglandi.

Í hálvt triðja ár hevur Pætur verið í starvi hjá Atlantsflogi sum ferðslusamskipari, men fyri ta tíð starvaðist hann í Grønlandi. Í 22 ár arbeiddi hann innan flogferðsluna, og hini árini hevur hann starvast innan ferðavinnuna.

### Í blóðinum

Sally er uppvaksin innan matstovuvinnuna í Onglandi, har foreldur hennara róku matstovu. Hon hevur tí stóran áhuga fyri hesi vinnu og hevur drúgvar royndir á økinum. Bæði Sally og Pætur hava ferðast nógv og hava sæð, hvussu slíkt virksemi verður rikið í øðrum londum.

Pætur sigur, at tey hava merkt ein stóran áhuga fyri virkseminum, sum tey nú eru farin undir í Saltangará.

– Nógv fólk hava ringt og fregnast. Vit hava sett á skránna, at trý jólaborð verða, og longu nú eru tvey teirra fult umbiðin, sigur hann.

Casa Blanca miðjar eftir at leggja eitt støði, sum ger, at viðskiftafólkini kenna seg væl og vitja aftur.

– Tað er ikki soleiðis, at hetta verður ein nýggj barr, hóast vit hava fult skeinkiloyvi. Matstovuvirksemið verður avgjørt tað primera hjá okkum.

Pætur sigur, at dentur verður lagdur á, at tey, sum vitja Casa Blanca og brúka pening uppá at njóta ein góðan bita og eina hugnaliga løtu, eisini skulu fáa eitt hugnaligt upplivilsi.

– Vit fara at hava buffe'ir við indiskum, kinverskum og meksikanskum rættum, og vit fara eisini at skipa fyri tí, sum vit rópa "dinner and dans".

### Hugni í hásæti

Pætur sigur, at tey – heldur enn at hugsa um at fylla húsið - fara at syrgja fyri, at umstøðurnar verða góðar hjá teimum, sum vitja innar.

– Tá ið vit fara at hava "dinner and dans", verður tað ikki soleiðis, at fólk verður rivin upp úr stólunum, har tey sita og práta og hugna sær, meðan hølini verða ruddaði til dans. Fólk verða sitandi, og dansurin kemur bara aftrat.

Hann heldur, at mátin við at fáa fólk at reisa seg, meðan ruddað verður fyri dansi, ofta tekur tann góða stemningin, sum er við borðini eitt slíkt kvøld.

– Vit fara ikki at leggja okkum eftir at fylla húsið við fólki, so ikki er verandi inni. Tað ger einki, um vit ikki gerast miljóningar tann fyrsta dagin, sum hann tekur til.

Casa Blanca fer at leggja dent á góða tænastu og hugna, og tí heldur hann, at eini 130-140 fólk er passaligt eitt slíkt kvøld, tá ið tey hava "dinner and dans".

– Tað kostar at fara út at eta. Fólk tosa um hetta, bæði áðrenn tey avgera at fara, og eisini tá ið dagurin ella kvøldið er liðugt. Tí er ógvuliga umráðandi fyri okkum, at fólk eru nøgd við ta tænastu, tey fáa og við umstøðurnar, vit hava at bjóða teimum, sigur Pætur.

### Innboðin í gjár

Í samband við, at Casa Blanca læt upp í gjár klokkan 18, hevði matstovan sent út 60 innbjóðingar til eina hugnaliga løtu á middegi í gjár. Umboð fyri stovnar, virkir, handlar og lokalar myndugleikar vóru boðin við, umframt familja, vinir og kenningar.

Hølini eru frískaði upp, og tey eru pyntaði. Orkis á Glyvrum hevur staðið fyri dekoreringini, og ein lokalur listamálari hevur hongt upp eina framsýning við málningum sum eru til sølu.

Casa Blanca fer at hava opið týsdag til hósdag frá klokkan 11.30-21, fríggjadag og leygardag frá klokkan 11.30-22 og sunnudag frá klokkan 12-18.

### Mánadag verður stongt

– Fólk kunnu keypa sær døgurða, og frá týsdegi til leygardag verður eisini buffet við eini seks ymiskum rættum, sigur Pætur Rasmussen.

Ætlandi verður fyrsta veitslan á Casa Blanca undir heitinum, "dinner and dans", 30. Oktober, og jólaborðini verða so aftur seinni.

# Undirhald við móttøkuna á Mýrunum

UNDIRHALD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið Runavíkar býráð mikudagin skipaði fyri hátíðarligari og stórfingnari móttøku á fyrrverandi Vistarheiminum í Runavík, sum kommunan hevur keypt og latið umbyggja til heim fyri minnisveik, var bæði felagssangur, tvírøddaður sangur og floytuspæl at hoyra.

Vit høvdu frásøgn frá móttøkuni í blaðnum í gjár, men tá var tíverri ikki pláss fyri øllum myndunum, vit kundu hugsað okkum at prentað.

Tí taka vit hesar myndirnar av tí frálíka undirhaldi, sum var, við í blaðið í dag.

Nógv fólk var til móttøkuna, sum eydnaðist sera væl.

Heimið á Mýrunum í Runavík er fyrsta sjálvstøðuga heimið av sínum slagi í Føroyum, sum burtur av er ætlað minnisveikum.

Tey fyrstu búfólkini eru flutt inn, og tá ið er fullsett, fer tað at hýsa átta minnisveikum fólkum úr Eysturoynni.



*Marita og Jonny løgdu fyri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Pól Jóhann og Liss undirhalda við sangi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hesar báðar stóðu fyri vælljóðandi floytuspæli*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*